

# Tað er kul at vera nørd!

Eydna Skaale
redaktørur

Tá eg gekk í skúla gleddust vit um hvønn frítíma. Tað fyrsta vit gjørdu hvønn einasta morgun, var at vita, um nakar lærari mundi vera sjúkur, so vit fingu frí. Í Hoydølum høvdu vit javnan trappustreykur, tá vit ikki tímdu at hava undirvísing.

Øll 13 árini í føroyskum skúlum var hetta hugburðurin hjá teimum allarflestu næmingunum. Vit tímdu ikki so mikið sum at klíva uppum, har garðurin var lægstur, nei, vit leitaðu eftir portrum, sum stóðu á víðan vegg fyri okkum.

Tá eg nú spyrji skúlabørn um, hvussu tað er at vera í skúla, tykist hugsanin um skúlan vera tann sama. »Tað er keðiligt«. »Feriurnar eru ov stuttar«. »Eg tími ikki skúlan«.

Eg veit ikki júst nær hesin hugburðurin kemur, tí børnini gleða seg at fara í 1. flokk. Men onkustaðni á leiðini gerst tað ókul at dáma at ganga í skúla. Tey, sum eru íðin, gera skúlating og skara framúr, eru nørdar. Og tað er ikki positivt at vera nørd.

Tá eg kom á universitetið í Keypmannahavn, fekk eg annað at síggja. Har vóru næmingar, sum brendu fyri útbúgvingini. Tey vildu skúlan, og tey tímdu hann. Umframt øll skúlatingini, sum sjálvandi vórðu gjørd, lósu fólk eina rúgvu eyka við síðunar av. Tey vóru sum svampar, sum sugu vitan til sín. Tey vóru aktiv og intiativrík, og tað var ókul at møta ófyrireikaður til undirvísing. Tað var kul at vera nørd.

Altjóða búskaparfrøðingar eru á einum máli um, at so hvørt sum miðalútbúgvingartíðin hjá fólki økist við einum ári, økist BTÚ við 6-10%.

Hóast alt fleiri føroyingar fara undir útbúgving, so liggur framvegis ein skúlanirðandi hugburður í okkara samfelagi. Tú hoyrir framvegis fólk siga í ramasta álvara, at tey, sum lesa, nassa. At tey eru dovin. Og ikki tíma at arbeiða. Sjálvt umboð fyri hægstu myndugleikarnar eru talsfólk fyri hesum hugburðinum. Herfyri hoyrdu vit í útvarpinum, at: »Fólk við útbúgving skulu slett ikki koma heim aftur, tí tey skapa onki virði fyri samfelagið«.

At vit so javnan hoyra niðrandi útsagnir um skúlar og tey lesandi, kann kanska vera ein av orsøkunum til, at næmingarnir í Føroyum leggja seg eftir at halda hánt um skúlan. Teir leggja seg eftir IKKI at vera nørdar. Tí í Føroyum er tað ikki kul at vera nørd. Hesin hugburðurin kann eisini vera ein av orsøkunum til, at tey klókastu høvdini ikki tíma heimaftur eftir loknan lestur.

Vit hava heimsins bestu lestrarskipan. Vit hava allan heimin sum lærupláss. Vit hava allar møguleikar opnar. Tað er bara spell, at hugburðurin ikki heilt fylgir við.

*Tí veruleikin er, at tað ER kul at vera nørd!*

# INNIHALDSYVIRLIT:


4 Klumma: Tað er kul at vera nørd
6 Vilja samstarva við føroyskar fyritøkur
8 Pisa – og hvat so?
10 Hvussu skal eg velja?
12 Fróðskaparsetur Føroya
14 Fylg dreyminum – ikki streyminum
16 Ymsir skúlar og útbúgvingar í Føroyum
18 Fá allar heimsins møguleikar
18 Býr á Oyri – lesur í Boston
20 Teknisku skúlarnir
21 United World College
22 Okkara Oyrasund
24 Jú fleiri hava útbúgving – jú ríkari gerst landið
26 Spyr um alt á ASK
26 Hentar heimasíður
26 Hvar lesa føroyingar?
28 Fylg dreyminum – ikki streyminum
30 Ymisk lestrartíðindi
30 Ymisk lestrartíðindi
31 At rokna um frá 13 stiganum til 12 stigan



**Redaktør:**
Eydna Skaale

**Blaðfólk:**
Eydna Skaale
Eyðun Klakstein
Rólant Waag Dam
Uni Arge
Vilmund Jacobsen

**Fotografar:**
Álvur Haraldsen
Jens Kristian Vang

**Umbróting:**
Tekniska Deild á Sosialinum

**Lýsingar:**
Eyðun Samuelsen

**Forsíða:**
Sosialurin

**Útgivið:**
Sosialurin 23. februar 2011